gult28 cyan28 magenta28 svart28

HEILSANIR

5. B á Glyvrum
Vit foreldur ynskja góðan túr til Hetlands. Takk Kaj-Åge og Deirdre fyri tykkara stuðul og vinarlag.
Heilsan foreldur

Góða langomma
Hjartaliga tillukku við 85 ára degnum. Okkum leingist eftir tær og Villi gubba. Vit vildu fegin havt verið har á føðingardegnum, men kanska verður tað næsta ár. Muss og klemm frá okkum 4 á Bornholm.
Vilhelm og Henry

Góði Victor
Hjartaliga tillukku við 14 ára føðingardegnum 16. juni. Væl afturkomin úr Álandi.
Ynskja omma og abbi við Ljósá

Kinky Ólavur
Enhver svigermors drøm... Takk fyri eitt super gott kvøld, og tillukku við føðingardegnum
Heilsan bowlararnir

»I believe I can fly«
Hopi ikki tú fer á flog nú tú ert blivin 16!
Bestu heilsanir eh...!

Góði Michael
Hjartaliga tillukku við 3 ára føðingardegnum 16. juni. Jesus veri hjá tær.
Ynskja mamma, stóri beiggi, omma og abbi

Eg veit at tú ert glað, nú ert tú blivin 16, men slappa nú av eina løtu og set teg og les.
Hoylsan okur buar

Góða Rakul
Vit ynskja tær tillukku við 17 ára føðingardegnum.
Kærar heilsanir omman og gumman

Kæri bróður
Tillukku við teimum 50 tann 18. juni.
Ynskja tínar 4 systrar

Góði elskaði Kim
Hjartaliga tillukku við 2 ára føðingardegnum 15. juni.
Ynskja mamma og babba

Góði elskaði Magnus og pabba
Hjartaliga tillukku við degnum. Vit elska teg.
Heilsan Lisbeth, Silja, Barbara og Anna

Góði fitti Kim
Hjartaliga tillukku á 2 ára føðingardegnum í dag.
Omma, abbi og Tóra

Góða elskaða Rakul!
Hjartaliga tillukku við 3 ára føðingardegnum 15. juni og alt gott í framtíðini.
Ynskja omma, abbi og Vár

Eg, mamma og Anton takka hjartaliga øllum við sendu gávur, telegramm, og sum ringdu á fermingardegi mínum 11. mai.
Ynskir Agnes Ellingsgaard, Rækker Mølle - Danmark



Eg og foreldur míni takka hjartaliga fyri gávur, telegramm, heilsanir og hjálp til mína konfirmatión 1. apríl 2001.
Bogi Krossteig

Góði elskaði Kim
Hjartaliga tillukku við 2 ára føðingardegnum.
Ynskir Heidi mostir

Heilsanir 30,- kr. Sosialurin

5 ferðir um vikuna

Gevið gætur

Bert heilsanir, skrivaðar á henda lepan og goldnar frammanundan við 30,- kr. fáa innivist í blaðnum. Til ber eisini at lata okkum lepan og gjald í avgreiðsluni á Argjavegi 26, millum kl. 8.00 og 16.00.

Myndaheilsanir skulu vera okkum í hendi á miðdegi 2 dagar fyri útkomudag. Viðmerkið annars niðanfyri, um heilsanin ynskist í blaðið ávísan dag.
❑ Týsd. ❑ Mikud. ❑ Hósd. ❑ Fríggjad. ❑Leygard.

Tekstur:.....
.....
.....
.....
.....
.....

Myndina aftur: Minnist til at skriva navn og bústað aftanfyri á myndina og at leggja við ein frankeraðan brævbjálva við navni og bústaði.
Um neyðugt fyri arbeiðsgongdina, taka vit okkum rætt til at fáa heilsanina í blaðið annan dag, enn tann ynskta.

Sent hevur (skal fyllast út).
Navn: .....
Bústaður: .....
Bygd/býur: ..... Tlf.: .....

Sendið lepan, mynd og gjald til:
Sosialurin
Postsmoga 76 •110 Tórshavn
Merkið bjálvan: **»Heilsanir«**

gult29 cyan29 magenta29 svart29

TILTØK

FØÐINGAR

27. mai fingu Margret Holm og Elmar Joensen, Vágur, ein son. Hann var 55 cm. langur og vigaði 3660 gr.

7. juni fingu Mary og Kári Petersen, Sandur, eina dóttur. Hon var 54 cm. long og vigaði 3700 gr.

8. juni fingu Sóleyð og Poul Klementsen, Sandur, eina dóttur. Hon var 53 cm. long og vigaði 3500 gr.

10. juni fingu Heidi M. Joensen og Kenneth Gaardlykke, Miðvágur, eina dóttur. Hon var 55 cm. long og vigaði 3800 gr.

10. juni fingu Helga og Bødvar Poulsen, Dalur, ein son. Hann var 55 cm. langur og vigaði 4350 gr.

11. juni fingu Sigrún Brend og Bjarnheðin í Hoyvík, Tórshavn, ein son. Hann var 57 cm. langur og vigaði 3650 gr.

11. juni fingu Unn og Jørgin Olsen, Runavík, tvíburðar, drong og gentu. Drongurin var 54 cm. langur og vigaði 3600 gr., gentan var 49 cm. long og vigaði 2900 gr.

13. juni fingu Chutimon Prommai og Petur Sigurd Petersen, Skála, ein son. Hann var 53 cm. langur og vigaði 3800 gr.

14. juni fingu Sonlis og Tummas Eli Høj Joensen, Strendur, eina dóttur. Hon var 52 cm. long og vigaði 3490 gr.

Hey, eg eiti Joen Hendrik, eftir langabba í Leirvík. Eg bleiv føddur 7. mai á Hvidovre hospital. Eg vigaði 3750 gr. og var 51 cm. langur. Foreldur míni eru Ninnie og Jakku Hansen, Keypmannahavn

ANDLÁT

08. juni
Dagmar Rasmussen, ættað úr Leirvík, búsitandi í Klaksvík, 84 ár.

09. juni
Annfinn Danielsen, Húsavík. 61 ár.
Petur Michelsen, í Tórshavn, 86 ár

10. juni
Jákup Monrad Joensen, Húsar. 62 ár.
Jacob Westergaard í Øravíkarlíð eisini nevndur Jacob hjá Poul á Økrum, 68 ár.

11. juni
Karl Justesen í Klaksvík, vanliga nevndur Karl hjá Mortan, 77 ár.

LÆKNAVAKTIR

Tórshavn:
Læknavaktin tlf. 310033

Eysturoy:
Leygard. 16. juni: Kári Rasmussen, tlf. 447010
Sunnud. 17. juni: Knud Jakobsen, tlf. 423006

Norðoyggjar:
Læknavaktin tlf. 458888

Vágar: tlf. 332413

Suðuroy (norður): tlf. 371560
Suðuroy (suður): tlf. 373030

Tannlæknavakt, Tórshavn
Bráðfeingishjálp fæst leygardag, sunnudag og halgidagar kl. 13-14. Tlf. 314544.

Gudstænastur
1. sunnudag e. Trinitatis
Christianskirkjan: kl. 11,
Norðoya Røktarheim: kl. 14.30, Niels Pauli Danielsen
Klaksvíkar sjúkrahús: kl. 10,
Haraldssund: kl. 11, Hans Eiler Hammer
Haldarsvík: kl. 11,
Tjørnuvík: kl. 12, Marjun Bæk
Bøur: kl. 11, familjugudstænasta, Inga Poulsen Dam
Gøtu: kl. 11, Kjartan Mørkøre
Vesturkirkjan: kl. 11, Heri Joensen
Argir: kl. 11, familjugudstænasta, Sverri Steinhólm
Fuglafjørður: kl. 11, altarg.,
Funningsfjørður: kl. 16, altarg., Uni Næs. (Í Fuglafjarðar prestagjaldi gongur talvan fyri nýggju bibliuútgávuna)
Selatrað: kl. 11, altar., Jógvan Friðriksson
Havnar kirkja: kl. 11, altarg., skriftamál kl. 10.40, Bjarni Bæk
Kaldbak: kl. 12, Sonja Klein
Miðvágur: kl. 11, altarg., David Johannesen
Kvívík: kl. 12, Hans J. Joensen, biskupur
Hattarvík: kl. 12, altarg.,
Kirkja: kl. 17, altarg., Elsa Funding
Porkeri: kl. 12, altarg., Erland Beder
Tvøroyri: Ólavur Rasmussen
Hvalba: P. M. Rasmussen
Dalur: kl. 12,

Adventkirkjan
Leygardagin kl. 10 barnabibliutími og bíbliugransking. Evni: Trúarhetjur. Kl. 11 gudstænasta, J. V. Danielsen.

Meinigheitin í Hoyvík
Sunnudagin kl. 14 í Hoyvíkar skúla sunnudagsskúli, um veðrið verður til vildar, grilla vit uttanfyri, kl. 17.30 bøn og kl. 18 møti við ungdómsbólkinum. Øll eru vælkomin.

Katólska kirkjan
Fríggjadagin kl. 17.30 messa í Kerit.
Leygardagin kl. 11.30 messa í Kerit.
Sunnudagin kl. 11 hámessa við Benny Blumensaat í Mariukirkjuni.

Ebenezer
Sunnudagin kl. 10 breyðbróting, kl. 12 sunnudagsskúli, kl. 18 evangel. møti, kl. 21 útimøti.

Meinigheitshúsið
Sunnudagin kl. 14 sunnudagsskúli – um viðrar fara vit útferð. kl. 18 Blákrossmøti við luttøku frá Kafé Blákrosstovan.

Rhema á Hálsi
Mikukvøldið kl. 20 evangeliskt møti.
Fríggjakvøldið kl. 18-19.30 A.T.A.P. kids.
Leygarkvøldið kl. 20 ungdómsmøti.
Sunnudagin kl. 11 møti og sunnudagsskúli.

KFUM og KFUK í Havn
Mánadagin kl. 15 í KFUK: Eldrasamkoman við Jóhannes Mortensen, trúboðara. Evni: Ruths bók.

Filadelfia, Landavegur 22
Í dag kl. 17 landsbøn. Í morgin kl. 11 morgunmøti við Tummas Jacobsen, kl. 18 kvøldmøti við Símun Absalonsen, kl. 22 útimøti við Evangeliihúsinum.
Mánakvøldið kl. 20 bønarskúlin.
Møtiskráin hjá Filadelfia sæst á heimasíðu okkara: www.filadelfia.fo

Hvítusunnusamkoman Yviri við Strond
Sunnudagin kl. 13 sunnudagsskúli, kl. 17 møti.

Samkoman Immanuel
Í kvøld kl. 20 Kongsins Herlið, 8 ár og eldri eru vælkomin.

Kirkju- og missiónshúsið á Argjum
Sunnudagin kl. 14 sunnudagsskúli og Junior, kl. 17.30 bønarløta.
Mánakvøldið kl. 20 ungdómsmøti við sang og vitniløtu.
Mikumorgunin kl. 07 bønarløta.
Heimasíða okkara: www.koma.fo

Kollafjørður
Møtirøð undir heitinum »Frælsi frá ótta« verður í skúlanum í Kollafirði fríggjakvøldið, leygarkvøldið og sunnukvøldið kl. 20. Talari verður Ólavur Jacobsen. Sangluttøka við Lovindu Leonsson, Rakul Jacobsen, Hans Jacob á Lava og fl.

Saron, Vestmanna
Sunnukvøldið kl. 18 evangel. møti, Steve Dulwich talar.
Mánakvøldið kl. 20 bønarmøti.

Vestmanna missiónshús
Sunnudagin kl. 14.30 sunnudagsskúli, kl. 18 møti við luttøku av Strondum.

Útimøti
Heimamissiónin hevur útimøti sunnudagin kl. 17 á Hellunum og kl. 19 í Oyndarfirði við sangbólkinum Gittit o.ø.

Filadelfia, Sundalagið
Í annaðkvøld kl. 18 møtirøð í Kollafjarðar skúla við Ólavi Jacobsen. Miðdepilin og Urtagarðurin halda summarfrí til 29.08.01.

Keldan, Skálafirði
Fríggjakvøldið kl. 20.30 vón fyri framman, við hugna, vitnisburði og sangi. Jens Vestergaard o.fl. luttaka. Sunnudagin kl. 17 møti við Agnar Westli frá Noreg. Barnamøti kl. 17. Tú ert vælkomin í Kelduna. www.keldan.fo

Meinigheitshúsið á Skála
Sunnudagin kl. 13.30 sunnudagsskúli, kl. 19 møti við Jógvan presti.

Ørkin, Saltangará
Einki møti verður sunnudagin vegna umvæling av høli.

Missións- og ungdómshúsið á Glyvrum
Sunnudagin kl. 14 sunnudagsskúli, kl. 19 møti við Hera Tróndheim. Øll eru hjartaliga vælkomin.

Missiónshúsið í Leirvík
Sunnukvøldið kl. 19 verður møti við Niels Jacob Nielsen, trúboðara. Øll eru vælkomin.

Lívsins Orð
Møti verður sunnudagin kl. 10.30 við Agnar og Synnøvu Westli frá Levende Ord í Bergen.

Soli Deo Gloria
Mikumorgunin kl. 06 Bøn, Sunnudagin kl. 14 sunnudagsskúli. Um viðrar fara vit eina útferð. Kl. 18 hava vit felagsmøti við Getsemane, við luttøku úr Danmark. Øll eru hjartaliga vælkomin.
Mánadagin kl. 20 Bønarmøti.

Missiónshúsið á Tvøroyri
Sunnudagin kl. 14 sunnudagsskúli. kl. 18 møti við Karl og Elidu Kenning. Øll eru hjartaliga vælkomin.

Betel, Vágur
Sunnudagin kl. 11 breyðbróting, kl. 13.30 sunnudagsskúli, kl. 18 evangel. fundur, kl. 21 útifundur um viðrar.
Ónsdagin kl. 20 bønar- og uppbygginarfundur.

Frelsunarherurin, Vágur
Sunnudagin kl. 14 sunnudagsskúli, útferð um viðrar. Kl. 18 møti við Dutti og Noomi.

Missiónshúsið í Vági
Sunnudagin kl. 14 sunnudagsskúli, kakao og bollar, kl. 18 møti. Øll eru hjartaliga vælkomin.

Reyði Krossur Føroya
Sorgarlinjan svarar mánadag, mikudag og fríggjadag kl. 19-21.00 á tlf. 212380.

EITT LJÓS Á GØTU MÍNI

Nei einki er sum tú mítt kæra heim.

Niðurlagið í ensku týðingini av sanginum, Í millum gyltar borgir, ljóðar: »Home, sweet home«, í føroysku týðingini ljóðar tað: Heim, heim, kæra heim. – Sangurin er sera yndisligur bæði á enskum og á amerikonskum.

Frá stóra amerikanska borgarakrígnum, sum herjaði fyri 130 árum síðani, verður sagt frá, at herliðini bæði bygdu sær legur hvør sínu megin eina stóra á.

Eftir at tónleikarnir í herinum høvdu spælt eina løtu, byrjaði annar parturin at spæla »Heim, heim, kæra heim«, og skjótt tóku hermennirnir í hini leguni undir.

Tað var ein hjartanemandi stund.

Í hesi løtu var allur fíggindaskapur fokin, allir kendu seg sum brøður. Allir tankar teirra vóru í hesi stund heima hjá teirra kæru, sum teir vóru farnir frá. Tárini runnu oman eftir veðurbardu kinnunum á hermonnunum. Tað verður sagt, at hermennirnir úr teimum norðastu státunum ikki sluppu at syngja hendan sangin, tí tá gjørdist tráanin og longsulin í teimum alt ov stór at sleppa heimaftur.

Hesir menn sluppu neyvan heimaftur fyrr enn bardagin var av. Men hetta sigur okkum í hvussu so er, og tað vitnar bæði bíblian og søgan um, at eitt er greitt: Eitt gott og trygt heim er tað besta, vit kunnu eiga í verðini.

John S. Myllhamar, trúboðari